


# Kongshavn sløk 5.000 tons fleiri

Landingarmiðstøðin Kongshavn í Saltangará hevur landað væl meiri fisk í 2009 enn nakað annað ár frammanundan. Samlaða nøgdin í fjør var tilsamans 37.391 tons ímóti 32.740 tonsum í 2008. Hetta er ein munur upp á sløk 5.000 tons. Vøksturin stavar serliga frá gulllaksi, men eisini er meiri upsi landaður í fjør enn árið fyri. Í 2008 landaði Kongshavn tilsamans 6.800 tons av gulllaksi, og í fjør vóru tonsini 9.420 í tali. Á landingarmiðstøðini Kongshavn siga tey, at fyrra hálva í ár royndist rættiliga væl, men í heyst hevur fiskiskapurin hjá skipunum, sum fiska upsa, ikki verið nakað serligur. Hinvegin royndist gulllaksaveiðan rættiliga væl í summarhálvuni.

## Kann seta ferð aftur á útjaðaran

Løgtingið fer í næstu framtíð at taka støðu til eina ætlan, sum kann skapa nógv arbeiði.

Miðflokkurin hevur nevniliga lagt uppskot fyri Løgtingið um at játta stuðul til at keypa frystan fisk fyri, sum síðani skal virkast á føroyskum fiskavirkjum, soleiðis sum bæði Fiskavirking og Vaðhorn mæla til í hinari greinini her á síðuni.

Í hesum sambandi skjýtur flokkurin upp at játta 7,5 milliónir til endamálið.

- Hendan skipan virkaði væl fyri nøkrum árum síðani, sigur Miðflokkurin.

Men so varð skipanin avtikin, tá ið fiskiskapurin undir Føroyum batnaði, men síðani tá er føroyska fiskiskapurin minkaðir 45.000 tonsum og flakavirkini hava ikki nóg góða og trygga rávørutilgongd.

- Avleiðingin er, at fleiri virkir kring landið eru latin aftur. Serliga í Suðuroy er støðan vánalig. Men kring alt landið er ov lítið av rávørugrundarlagi til flakavirkini og hetta gongur út yvir inntøkugrundarlagið hjá flakafólkinum.

Miðflokkurin sigur, at verða 7,5 milliónir játtaðar til at at keypa frystan tosk úr triðjalondum, kunnu 5.000 tons virkast á føroyskum flakavirkjum.

Hetta svarar til eitt útflutningsvirði upp á 200 milliónir krónur, harav einar 20 milliónir høvdu verðið útgoldnar í lønum.

- Fyri landskassan er talan um eina nettoinntøku, tí inntøkurnar av skatti, mvg og øðrum avgjøldum eru væl hægri enn stuðulin.




*Letur landið eitt sindur í stuðuli, fær landskassin hetta fleiri ferðir afturlønt, tí talan kann skjótt verða um hetta hevði kastað einar 150-250 milliónir av sær til samfelagið, umframt at taka skapar støðugt arbeiði til eini 400 fólk, siga tey á Vaðhorn og á Fiskavirking*

*Savnsmynd*

# Kunnu fáa 400 fólk til arbeiðis afturat

**Í eini handarvending kann samgongan skapa fortreytirnar fyri at fáa útvega arbeiði til eini 400 fólk afturat á fiskavirkjunum kring landið, sum í dag standa tóm**

ARBEIÐSSKAPANDI

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað hevði borið væl til at útvega eini 400 fólkum afturat arbeiði á teimum føroysku fiskavirkjunum.

Tað eru tey á fiskavirking og á Vaðhorn á Eiði samd um, nú fleiri flakavirki kring landið standa gapandi tóm.

Nógvar hundrað hendur sita fyri einki og trilla tummlar og arbeiðsloysistølini ganga bara ein veg og tað er uppeftir.

Samstundis vísa tølini, at næstan 90% av teimum, sum hava mist arbeiðið seinastu mánaðirnar, eru tímalønt verkafólk.

Men bæði Jógvan Gregersen á Vaðhorn og Símun P. Jacobsen á Føroya Fiskavirking, siga, at tað hevði borið væl til útvega arbeiði til eini 400 fólk á fiskavirkjum kring landið.

Tað, sum teir hugsa um, er at innflyta frystan fisk til at virka í Føroyum.

### Neyðugt við stuðuli

Men teir eru eisini báðir samdir um, at skal hetta eydnast til fulnar, verður neyðugt, at landskassin letur eina ávísa upphæd í stuðuli til at keypa frystan fisk fyri, sum síðani kann flytast inn og virkast á føroyskum virkjum.

- Hevði landskassin latið einar 30 milliónir í stuðuli til eina slíka ætlan, hevði tað kanska útvega arbeiði til eini 400 fólk, sigur Jógvan Gregersen á Vaðhorn.

Hann sigur samstundis, at hesin stuðulin hevði komið fleiri ferðir aftur í landskassan, tí tað virksemið, sum hetta hevði ført til, hevði kastað einar 150-250 milliónir aftur av sær til samfelagið í virðisøking.

Símun P. Jacobsen á Fiskavirking er sannførdur um, at tað er rættiliga veruleikakent, at hetta hevði kastað eini 400 arbeiðspláss av sær og hann er púra samdur um, at vinningurin, sum samfelagið fær, er nógvar ferðir størri enn stuðulin, sum hetta hevði kostað landskassanum.

### Óavmarkaðir møguleikar

Teir vísa báðir á, at fyri nøkrum árum síðani varð frystur fiskur innfluttur, men tá ið fiskiskapurin hjá føroysku skipunum batnaði aftur, varð stuðulin tikin av og tá datt hetta mestsum niðurfyri.

Men nú fiskiskapurin nú er versnaður aftur, halda teir, at hetta hevði verið ein sjálvsagdur møguleiki at roynt aftur.

Teir hava ikki hug at kalla hetta studning. Teir vilja heldur kalla hetta endurgjald fyri toll og frakt.

- Skulu teir á Vaðhorn innflyta frystan fisk úr Íslandi og Noregi, kostar tað eina krónu fyri kilo at flyta hann til Føroyar, men so kann hann flytast tollfríur á ES marknaðin eftir eini kumuleringsavtalu ímillum partarnar.

Vaðhorn er eitt saltfiskavirki og hjá teimum nyttar ikki at innflyta fisk úr triðjalondum, tí tollurin á saltfiski er alt ov høgur.

Hinvegin hevur Fiskavirking mest flakavirki og tey kunnu innflyta fisk úr triðjalondum, tí tollurin av at selja á ES marknaðinum er tað, sum svarar til eina góða krónu fyri kilo av ráfiski.

So tað, ið bæði Vaðhorn og Fiskavirking tosað um, er, letur landið ein stuðul ið svarar til áleið hálvaaðru krónu fyri kilo av ráfiski, verða fortreytir skaptar fyri at innflyta rættiliga nógvan frystan fisk til Føroyar at virka á virkjunum kring landið.

Bæði Jógvan Gregersen og Símun P. Jacobsen siga, at útboðið av frystum fiski er stórt, so møguleikarnir at keypa eru at kalla óavmarkaðir.

Teir siga eisini, at teir fáa javnan tilboð um at keypa fisk úr Alaska, Russlandi og Grønlandi, men møguleikar eru eisini at fáa fisk aðrastaðni.

- Tað kann gott koma upp á tal at innflyta eini 20.000-30.000 tons av frystum fiski og tað hevði kastað einar 120-150 milliónir av sær í arbeiðslønum til eini 400 fólk, alt eftir, hvat fiskurin verður virkaður til, sigur Jógvan Gregersen.

Símun P. Jacobsen á Fiskavirking nevnir eitt meiri hovligt dømi, at letur landskassin 7,5 milliónur í stuðuli, hevði tað borið til at innflutt 5000 tons av frystum fiski og tað hevði kastað einar 20 milliónir av sær í beinleiðis lønarútreiðslum til flakafólk, umframt alt avleitt virksemi.

- Vit eru í eini støðu, har vit hava eitt arbeiðsloysi sum veksur og har samfelagið hevur brúk fyri inntøkum og tí halda vit, at hetta er ein sjálvsagdur møguleiki, leggur hann afturat.